**NES KOMMUNA**

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

# Almenn Svimjing 2007/2008

**Tann almenna svimjingin í Tofta skúla byrjar mánadagin hin 03.12.2007 og vera tíðirnar hesar:**

**Mánadag:**
- Børn og vaksin ..... kl. 17.00 til 18.00
- Børn og vaksin ..... kl. 18.00 til 19.00
- Vaksin ..... kl. 19.00 til 20.00

**Mikudag:**
- Mammur og børn undir skúlaaldri ..... kl. 16.00 til 17.00
- Mammur og børn undir skúlaaldri ..... kl. 17.00 til 18.00

**Hósdag:**
- Børn og vaksin ..... kl. 17.00 til 18.00
- Børn og vaksin ..... kl. 18.00 til 19.00
- Vaksin ..... kl. 19.00 til 20.00

**Leygardag:**
- Vaksin ..... kl. 08.00 til 09.00
- Børn og vaksin ..... kl. 09.00 til 10.00
- Børn og vaksin ..... kl. 10.00 til 11.00

**Kostnaðurin er:**
- Útleigan ..... kr. 260,00 pr. tíma
- Almenn svimjing vaksin ..... kr. 20,00 pr. tíma
- Almenn svimjing børn ..... kr. 5,00 pr. tíma

*Vinarliga*

**Nes kommuna**



## Leyst starv

### Kirkjugarðurin við Velbastaðvegin

Søkt verður eftir einum fólki til alt fyrifallandi arbeiði í kirkjugarðinum. Partur av arbeiðinum er grevstur við maskinu. Upplæring kann gevast.

Millum aðrar uppgávur eru t.d. gøturøkt og upprætting av gravsteinum. Grasslættur hevur vanliga verið útboðin til privatan veitara.

Arbeitt verður í dagligum samstarvi við hini starvsfólkini í kirkjugarðinum.

**Førleikakrøv**
Koyrikort í flokki B ella til traktor/motoramboð.
Útbúgving í smíð ella jarðarbrúk er viðkomandi, men ikki eitt krav.

**Setanarviðurskifti**
Starvið er tímalønt fulltíðarstarv. Lønin, herundir viðbøtur, er sambært sáttmálanum millum Havnar arbeiðsmannafelag og Kommunala arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Stutt, skrivlig umsókn skal sendast Tórshavnar kommunu, Postsmogu 32, 100 Tórshavn ella til torshavn@torshavn.fo. Merkið umsóknina "kirkjugarður". Umsóknin skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 17. desember 2007.

Umsóknin eigur at innihalda upplýsingar um royndir og møgulig avrit av viðmælum og prógvum um relevanta útbúgving.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til: Johannes Jacobsen, gravara, tlf. 31 20 31 ella 21 05 70 ella Jógvan Olsen, røktarleiðari, tlf. 30 20 29 + lokal 1157 ella 27 36 80

**Lesið meira um størvini á www.torshavn.fo/leysstorv**

**Tórshavnar kommuna**

REPROZ

www.sosialurin.fo

www.sosialurin.fo

*Pensiónistaskeiðini 2008*

*1. skeiðið:*
*7. til 16. januar*

*2. skeiðið:*
*28. januar til 6. februar*

Útferðir, fyrilestrar, kvøldsetur og mangt annað til gamans og álvara.

**Kostnaður:**
Støk á dupultkamari: **kr. 1.450,-**
Hjún: **kr. 2.300,-**
Einakamar: kr. 2.000,-
Alt íroknað.

***Føroya Fólkaháskúli***
***Háskúlavegur 14 - FO 100 Tórshavn***
***Telefon 311743***
***E-Mail: haskulin@haskulin.fo***
***Heimasíða: www.haskulin.fo***

## Íverksetanarstudningur til listafólk í 2008

Mentanargrunnur Landsins letur einum listafólki íverksetanarstudning við støði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningurin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leigu av atelieri, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000,- árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi mánadagin 31. desember 2007.**

**Mentanargrunnur Landsins** - Tórgarðsgøtu 42 - FO-100 Tórshavn
Tlf. 32 08 42 - fax 31 19 98
mentan@mentanargrunnur.fo - **www.mentanargrunnur.fo**